# Petsi – ein dugnalig songkvinna



**Vit hava leingi vitað, at Petsi hevði gávur. Og eisini at hon hevði høg framtíðarmál. Til tíðir kundi tað undra, at ein so ung genta kundi vera so miðvís í sínum gerningi. Fyri nøkrum árum síðani vitjaði eg stutt inni á gólvinum hjá Petsi og teimum í Ålborg, og hon var fús at seta seg við klaverið og syngja ein ella tveir góðar. Av og á havi eg hoyrt heimaupptøkur uppi hjá ommuni, og altíð er tað tað yndisliga við sanginum, sum festir seg**

KONSERTUMMÆLI
*Hanna Jensen*

Hon hevur verið virkin í sangi og tónleiki, síðani hon sum 9 ára gomul flutti til Ålborg. Áhugin var sjálvandi langt síðani kveiktur, men tað sá út til, at hon fekk stórar møguleikar at menna seg, nú hon flutti. Hon hevur gingið til frálæru í sangi, síðani hon var 11 ár, og tá hon fór á studentaskúla, skuldi tað vera ein, har hon fekk góða tónleikafrálæru. Harafturat hevur hon sungið í kirkjukóri, lært at spæla klaver og gingið á MGK (Musikalsk Grundkursus), sum flestu, ið sleppa inn á konservatorium í Danmark, hava verið ígjøgnum. Og tað hevur hon eisini klárað, at sleppa inn á Jysk Konservatorium, sum er sera væl umtókt í DK.

17. apríl hevði hon tvær konsertir í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Og tað var spennandi at sleppa at hoyra, hvat hon hevði til okkara. Tað er jú torført at ímynda sær, tí hon hevur ikki havt nógv tónlistarligt virksemi her í Føroyum.

Sum Petsi sjálv avdúkaði dagarnar frammanundan konsertunum, so var tað ein coverkonsert. Hon hevði valt sangir, sum hon hevur tikið at sær ígjøgnum árini. Og tað í sær sjálvum er forvitnisligt, tí júst valið sigur nógv um sangaran, tað kann lýsa ein hugburð og gevur røddini karmar at virka í. Og sjálvandi liggur nakað egið í tukingini av sanginum. Sum skilst, so ynskir Petsi at menna seg meiri sum sangskrivara, áðrenn hon ber sítt egna tilfar fram, og tað er áhugavert.

Sangirnir, hon hevði valt at framføra fyri okkum, vóru:

*You Were Meant for Me*
*Smooth Operator*
*I Can´t Make You Love Me*
*I Don´t Know Why*
*We Both Know*
*Fever*
*Maður stóð við stovuvegg*
*Natural Woman*
*Hallelujah (Leonard Cohen)*
*Tennessee Waltz*
*This Kiss*
*Nothing Compares 2 U*
*That I Would Be Good*
*Mest når det er regn*
*Save the Best for Last*
*Little Wing (Jimi Hendrix)*
*Nine to Five*

Sum sæst, so vóru kærleikssangirnir í meiriluta, og serstakliga vóru sangir, sum aðrar songkvinnur hava sungið, umboðaðir. Har var Sade, Sissel Kyrkjebø, Jewel, Alanis Morisette, Dolly Parton og aðrar. Men Petsi gjørdi í fleiri førum sína heilt serstøku útgávu, væl gjøgnumhugsað. Eg hugsi um blandingsútgávuna av "Nothing Compares 2 U", sum var eitt sindur av Prince, eitt sindur av Sinead O'Connor og eitt sindur av egnum hugskotum. Og úrslitið var eitt sindur rokkut og eitt sindur jazzut. "Smooth Operator" svingaði væl, og klaversolospælið var framúr gott. "Fever" kom í eini óvanligari og góðari útgávu við einum, um eg so má siga, "rullandi" trummuspæli sum grund.

Mær dámdi best "Smooth Operator" og "Little Wing", sum gjørdist rættiliga ógvusligur og inniligur móti endanum, tá Michael skifti kassaguittaran um við hin elektriska. Og harafturat dámdi mær sera væl "Hallelujah" og "That I would be good" Og eg rokni við, at tað er tí, at teir eru sorgblíðir bæði í lagi og teksti. Teir fara eitt sindur djúpari enn teir vanligu kærleikssangirnir - alt gott um teir - og hugleiða meiri um lívið.

Eg fall púrasta fyri kórsanginum í "Mest når det er regn" Guittaristurin og trummuspælarin sungu, og rættasta orðið at nýta er vakurt.

Petsi er ein dugnalig songkvinna, við áherðslu á "dugnalig". Væl hoyrist, at hon hevur arbeitt við røddini, vant hana sum eitt annað ljóðføri. Tað var týðiligt, at teknikkur og djúptøknir smálutir vóru í fokus. Hon kundi so at siga alt. At laga røddina til sangslagið so sum countryrødd, rokkrødd, jazzrødd osfr. Og at taka ein tónastiga nú og tá. Serliga styrki vísti hon á teimum hægru tónunum. Hon dugdi at skapa eitt hart, eitt gleðiligt, men eisini eitt inniligt og sorgblítt huglag. Í "Hallelujah" vísti hon millum annað, hvussu leingi hon kundi halda tónanum við somu styrki, og tað ljóðaði so væl.

Tónleikararnir eru nakrir hon kennir frá tónleikalívinum í Ålborg, frá MGK og øðrum. Michael Møller spældi guitar, Søren Gemmer spældi á tangentar, Rasmus Boje á bass og Rasmus Petersen spældi trummur. Og eisini teir vóru sera dugnaligir. Eg fekk ta fatan, at teir sótu og hugnaðu sær hvør við sínum ljóðføri, og Petsi við sínum ljóðføri fall sera væl inn í samanspælið. Tey samskiftu væl, og tónleikagleðin, sum strálaði frá teimum, smittaði. Lætst tú eyguni aftur, so fekst tú eina kenslu av at vera á café við livandi tónleiki - serliga ígjøgnum fyrru helvt av konsertini, sum sýntist eitt sindur friðarligari enn seinna helvt, tí tá kom country og rokkur á skránna.

Mær dámdi væl konsertina, tað var gott at sleppa at sita og njóta tað, hon gav av sær sjálvari. Og spennandi verður at hoyra hennara egna tilfar og eina fløgu, tá hon avger at fara í holt við tað.





UTTAN ÚR HEIMI

# Muslimaleiðari vil hava fleiri sjálvmorðsatsóknir í Bretlandi

**Abu Hamza, sum er leiðari hjá muslimum í Bretlandi, mælir sínum viðhaldsfólki til at fremja sjálvmorðsatsóknir at bretskum málum**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Abu Hamza vakti ans um allan Vesturheimin, tá hann alment fagnaði teimum, sum framsu atsóknina at World Trade Center og Pentagon tann 11. september í 2001.

Nú fer hann uppaftur longur. Á einari bandupptøku, sum limirnir í samkomu hansara í Finsbury Park í London hava fingið, biður hann sínar stuðlar skipa fyri heilagum kríggi ímóti Bretlandi. Somu áheitan hevur hann sent ígjøgnum alnótina.

Á bandinum endurtekur hann fagnaðin til teirra, sum søktu at New York og Washington. Hann ger greitt, at amerikanararnir høvdu sjálvir skyldina av atsóknini, og hann hóttir við, at vit fara at síggja tað sama henda aftur. Abu Hamsa rósar eisini Osama bin Laden, sum hann sigur vera eina fyrimynd hjá øllum pínslarváttum.

Bretsku myndugleikarnir hava skuldsett Abu Hamza fyri at eggja fólki at fremja yvirgang, og mánadagin var hann í rættinum í London. Ta seinastu tíðina hevur hann roynt at vanda sær betur um orðini, og eygleiðarar í London halda, at tað kemur honum illa við, at blaðið Daily Mail nú hevur almannakunngjørt innihaldið í bandupptøkuni.

Bretska løgreglan hevur gjørt greitt, at áheitanin á bandupptøkuni er ein hóttan ímóti trygd Bretlands. Hinvegin er greitt, at teir vanligu muslimarnir í Bretlandi taka ikki undir við Abu Hamza, men á bønarfundum, sum hann framvegis sleppur at halda, verður eldur settur á bretsk fløgg, og samkoman mælir til kríggj í navni Islams.



*Abu Hamza mælir sínari samkomu í London til at fremja yvirgang í sjálvum Bretlandi*
*Mynd: Reuters*

"Nógvir brøður vilja fegnir vera heilagir stríðsmenn, men teir eru so kúgaðir í sínum egna landi, at teir vilja sleppa burtur haðani. Teir vilja sleppa í heilagt kríggj í Kekenia, Eritrea og í Afghanistan, men teir tora ikki at fara í heilagt kríggj í sínum egna heimlandi. Men tað hevði verið eitt størri avrik, og tað er skylda okkara at rættleiða heimland okkara. Latum okkum lata eyguni upp, og latum okkum ikki fara í heilagt kríggj langt burturi frá teimum londum, sum vit búgva í. Tær nýtist ikki at ferðast fleiri túsund fjórðingar fyri at gera pínslatrvátti, tí tað kanst tú gerast uttan fyri tínar egnu dyr."

*(Brot úr bandupptøku hjá Abu Hamza)*

# AI finst at avrætting

**Myndugleikarnir í Afghanistan hava avrættað ein mann, sum var dømdur til deyða, men Amnesty International finst hvassliga at mannagongdini**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í juli í 2002 var afghanski herleiðarin Abdullah Shah ákærdur fyri at hava beint fyri tveimum av sínum egnu konum og tveimum av sínum egnu børnum. Harafturat var hann ákærdur fyri at hava beint fyri 16 øðrum fólkum.

Herfyri dømdi ein hernaðardómstólur Abdullah Shah til deyða, og tann 19. apríl varð hann avrættaður.

Amnesty International og afghanski mannarættindafelagsskapurin finnast hvassliga at mannagongdini undir rættarmálinum. Sambært AI fekk tann ákærdi ongan verja, og sjálvt rættarmálið bleiv hildið handan stongdar dyr.

Harafturat bleiv dómarin skiftur út mitt undir viðgerðini, tí illgruni var um, at hann hevði tikið ímóti mutri.

Avrættingin av Abdullah Shah er tann fyrsta í Afghanistan, síðani Talibanstýrið bleiv rikið frá.

## Húsamarknaður í vanda

Seinastu árini er húsaprísurin í Bretlandi hækkaður so nógv, at serfrøðingar nú eru farnir at ávara myndugleikarnar um, at vandi er fyri einum veruligum skrædli.

Í dag kostar tað í meðal góðar tvær milliónir krónur at keypa sær eini sethús í Bretlandi, men vilt tú sleppa at eiga egin hús í London, noyðist tú at leggja tríggjar milliónir krónur á borðið. Ætlar tú tær at búgva í tí fína býarpartinum Chelsea, er prísurin um seks milliónir krónur. Eina lítla íbúð kanst tú fáa í London fyri eina millión krónur, men skalt tú hava eina av teimum størru íbúðunum, kann prísurin lættliga kom upp ímóti níggju milliónum krónum, skrivar Reuters.

Samstundis vísa framrokningar, at sethúsaprísurin fer at hækka seks prosent í ár, og gongdin hevur fingið serfrøðingar at ávara um, at her verður galin endi. Teir siga seg vænta, at Bank of England fer at seta rentuna upp fyri at tálma gongdini, og tað kann taka beinini undan mongum.

## Clinton skrivar lívssøgu

Fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton er í ferð við at skriva sína ævisøgu. Hann hevur valt at kalla bókina "My Life" (Mítt lív), og hon verður ætlandi at fáa í bókabúðunum í USA í juni.

Tað er tað kenda forlagið Alfred A. Knopf, sum gevur bókina út, og sambært amerikonskum fjølmiðlum hevur forlagið goldið Bill Clinton ímillum 70 og 80 milliónir krónur fyri útgávurættindini. Tað er lítið at ivast í, at mong fara at keypa bókina, og serliga bíða mong eftir, hvat Clinton fer at skriva um sambandið við skrivstovukvinnuna Monicu Levinsky.

Summir politiskir eygleiðarar siga, at bókin hjá Clinton kann fáa stóran týdning fyri valstríðið hjá John Kerry upp undir forsetavalið í heyst. Ein talskvinna hjá John Kerry sigur við CNN, at alt, sum kann lýsa ta stóru búskaparframgongdina í USA í Clinton-tíðini, gagnar valstríðnum hjá Kerry.

## Gera kirkjur til hotell

Í fleiri londum so sum Týsklandi, Írlandi, Danmark og Niðurlondum er tað vorðið rættiliga vanligt, at gamlar kirkjur verða umbygdar, so tær kunnu nýtast til gistingarhús ella onnur endamál. Tað hendir eisini meiri enn so, at kirkjur verða dansihøli, hóast øll ikki eri líka fegin um tað.

Í Noregi verður nú tosað um at umbyggja gamlar krikjur, so tær kunnu nýtast til okkurt gott endamál, sum tikið verður til. Eitt nú hava tónleikarar í Oslo kært seg um stórar hølistrupulleikar, og teir hava í hesum sambandi víst á, at tað kundi verið skilagott at umbygt onkra av teimum gomlu kirkjunum í býnum til tónleikahøli.

Tað finnast fordømi í norska høvuðsstaðnum. Í 1985 góvust fólk at nýta Jákupskirkjuna í Oslo. Tosað varð um at taka kirkjuna niður, men eftir drúgt orðaskifti endaði tað við, at hon bleiv umbygd til eitt mentanarhús, og fyri fýra árum síðani lat Mentanarhúsið Jákup upp. Nú verða kanska fleiri av hesum slagnum, skrivar Dagsavisen.

## Milliónir fyri frímerkir

Tað eru tey, sum eru til reiðar at gjalda nógvar pengar fyri at fáa fatur á sjáldsomum frímerkjum, og fyrrakvøldið rindaði ein dani 2.187.500 krónur fyri eitt hefti við frímerkjum frá 1852.

Á uppboðssøluni í Keypmannahavn var eisini eitt frímerki, sum stóð uttan á einum brævi, sum varð sent tann 1. apríl í 1851. Fyrsta boðið var 200.000 krónur, og eftir fáum minttum varð tað selt fyri 340.000 krónur. Her er kanska vert at nevna, at tey fyrstu donsku frímerkini komu í 1851.

Frímerkini, sum vórðu seld mánakvøldið, eru úr einum av teimum best kendu frímerkjasøvnunum í Danmark. Ein partur av savninum varð seldur seinasta heyst.